# Koyrikortið – nýggj og betri frálæra

**Tann 1. august kemur nýggj frálæru- og dømingarskipan til vanligt koyrikort í gildi. Frálæran leggur upp til at geva næmingunum ein góðan hugburð og atburð í ferðsluni - og at hava fyrilit fyri øðrum, serstakliga veikum ferðandi, so sum børnum og eldri fólki**



*Framyvir skal koyrikortfrálæran samskipast soleiðis, at tað, tú lærir í teori, skal roynast í verki, áðrenn farið verður víðari í teorifrálæruni*
*Mynd: Bárður Lydersen*

KOYRIKORT

Tá ferðslulógin, á sumri í 2000, varð broytt, var ætlanin, at ein nýggj koyrikortkunngerð skuldi gerast.

Av tí, at føroyska ferðslulógin liggur tættast upp at donsku ferðslulógini, var skilabesta loysnin at gera føroysku kunngerðina við støði í tí donsku, sum er grundað á eitt ES boðskriv um koyrikort.

Mett verður, at donsku frálæruætlanirnar til allar koyrikortbólkar eru tær, sum neyvast áseta, hvønn kunnleika, dugnaskap og atburð koyrinæmingur skal hava fyri at kunna útvega sær koyrikort.

Eisini byggir skipanin á, at frálæran í teori og verki skal samskipast og fylgja uppsetingini í lesiætlanini, sum er gjørd við støði í frálæruætlanini. Hetta verður mett at vera tann besti pedagogiski hátturin at læra.

### Gamla skipanin

Galdandi skipan byggir á gomlu norsku skipanina, sum við tíðini er bøtt og nútímansgjørð, uttan at føroyingar rættiliga hava megnað at fylgt við. Galdandi teoriroyndirnar eru grundaðar á sokallaðu ”multiple choice” skipanina, har tríggir svarmøguleikar eru í hvørjum spurningi. Næmingurin skal so taka støðu til, hvat av teimum trimum er rætta svarið.

Teoriroyndirnar, sum higartil hava verið nýttar, eru í einum bóklingi, sum næmingurin skal lesa spurningarnar burtur úr. Hann skal taka støði í einari lutfalsliga lítlari mynd ella tekning, samstundis sum hann eisini skal krossa av á einum oyðublaði.

Henda skipan hevur víst seg at verið trupul hjá næmingum, sum eru lesiveikir og eldri fólkum, ið hava ilt við at hava yvirlit við fleiri viðurskiftum í senn.

Tað hevur verið trupult hjá teimum at klára galdandi teoriroynd fyrstu ferð. Ikki tí, at tey ikki duga ferðsluteoriina nóg væl, men heldur orsaka av, at tey ikki megna at umseta skrivaða tekstin í verki og tí taka skeiva støðu.

### Nýggja skipanin

Nýggja skipanin byggir á, at næmingurin fær eina ferðslustøðu við einari mynd á telduskermin. Hann upplivir støðuna, sum hann sær hana, tá hann situr aftan fyri róðrið í bilinum.

Harnæst verður, í hátalara, givin upplýsing um myndina ella ferðslustøðuna. Síðani verður næmingurin, eisini í hátalara, spurdur tríggjar ella fýra spurningar um ferðslustøðuna. Nú skal hann, á telduskerminum, svara ”ja” ella ”nei”. Tað vil siga, at hann skal taka støðu til, hvat skilabest er at gera í støðuni. Sostatt er ongin tekstur at taka støðu út frá, sum tað er í galdandi royndum.

### Lesiætlan

Talan er um eina skipaða frálæru, við einum minst ásettum tímatali fyri teori- og verkliga koyrifrálæru, fyri hvønn koyrikortbólkin sær. Gjørd er ein lesiætlan fyri hvønn koyrikortbólk, sum fylgir neyvt uppsetingini í frálæruætlanini.

Tað vil siga, at næmingurin altíð veit, hvar hann er staddur í frálærutíðarskeiðnum, og koyrilærarin hevur eitt gott amboð at undirvísa eftir.

Frálæran í teori og verki skal samskipast soleiðis, at tað, tú lærir í teori, skal roynast í verki, áðrenn farið verður víðari í teorifrálæruni.

Koyrinæmingurin skal so hvørt leiðast frá lættari til truplari venjingar, og skal haraftrat hava møguleika fyri endurtøku av undanfarnum venjingum, so at vanda atferðin verður fest og styrkt.

Tað eru tó altíð fyrst og fremst viðurskifti og evni hjá tí einstaka næminginum, ið eru avgerandi fyri, hvussu nógvar skúlatímar – útyvir teir í minsta lagi ásettu skúlatímarnar – næmingurin skal hava, áðrenn hann kann fara upp til roynd.

*Kelda: www.akstovan.fo*

# Lívshættisligt leikutoy

**Pocket-bikes eru smáar motorsúkklur ætlaðar børnum niður í 10 ára aldur. Hetta er lívshættisligt leikutoy, ávarar Ráðið fyri Ferðslutrygd. Hóskvøldið í farnu viku kostaði ein túrur á eini slíkari súkklu einum níggju ára gomlum smádreingi í Stavanger lívið**



*Hóast tað er ólógligt, eri ikki óvanligt at síggja børn koyra á vegunum á Pocket-bikes og í smáum el-bilum. Tey, ið varða av ferðslutrygdini, halda, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn hetta óskil fær álvarsamar avleiðingar*

FERÐSLUTRYGD

Ráðið fyri Ferðslutrygd heitir á foreldur um ikki at lata børn koyra á Pocket-bikes ella í smáum el-bilum.

Hetta eru sera vandamikil leikutoy, sum kunnu føra til álvarsamar vanlukkur.

Hóskvøldið í farnu viku hendi ein syndarlig vanlukka í Stavanger í Noregi, tá ein nýggju ára gamal smádrongur, við Pocket-bike sínari, stoytti saman við einum lastbili.

Drongurin doyði á staðnum.

Ætlanin við Pocket-bikes og el-bilunum er óivað, at koyrast skal uttan fyri alfaraveg, og tey verða heldur ikki skrásett í akfaraskránni. Sambært ferðslulógini skulu akfør, sum koyra á vegunum verða skrásett, og tað er tí ólógligt at koyra á alfaravegi við hesum motorsúkklum og bilum.

Veruleikin er tó, at børnini, hóast tað er ólógligt, koyra á vegunum, bæði á Pocket-bikes og í smáu el-bilunum.

Politi'ið, Akstovan og Ráðið fyri Ferðslutrygd hava vent sær til politiska myndugleikan, við áheitan um at forbjóða innfluttningi av Pocket-bikes í Føroyum.

Men enn er einki hent, og tað er framvegis loyvt at innflyta hesar súkklur.

Tað er ikki óvanligt at síggja børn súkkla og koyra við Pocket-bikes og el-bilum úti á alfaravegi, til stóran vanda fyri bæði tey sjálvi og onnur.

Nevndu partarnir, ið varða av ferðslutrygdini, halda, at tað er ein spurningur um tíð, áðrenn tað fær álvarsamar avleiðingar fyri hesi børn ella onnur, um einki verður gjørt fyri at venda gongdini.

Slíkt má ikki henda hjá okkum, og tí má einhvør nýtsla av Pocket-bikes og smáu el-bilunum forbjóðast í Føroyum, sigur Ráðið fyri Ferðslutrygd.

*Kelda: www.ferdslutrygd.fo*


· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo